Jørgen Niclasen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Jacob Vestergaard
Bárður á Lakjuni
Árni Skaale
Beinir Johannesen
løgtingsfólk

Broytingaruppskot II

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 99/2023: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "Stk. 2. Kommunan tekur, í semju við bóndan, avgerð um, hvørjar hagagøtur eru útvaldar sambært stk. 1."

2. § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   "Uttan mun til ásetingina í § 3 kann handilslig ferðavinna bara útinnast og skipast í semju við bóndan."

Viðmerkingar
Undir viðgerðini hevur verið ógreitt, hvørji rættindi jarðareigarar hava í mun til atgongd og gjald. Hetta hevur serliga verið orsakað av orðingum, ið eru veikar. Tí mæla uppskotssetararnir til at seta inn orðið í semju, heldur enn samráð, so ongin ivi er.

Serligar viðmerkingar:

Ad. 1
Við broytingini skulu avgerðir um, hvørjar hagagøtur eru útvaldar og í hvønn mun handilslig ferðavinna kann útinnast, takast í semju við viðkomandi bónda og ikki í samráð.

Á Løgtingi, 21. mai 2024

Jørgen Niclasen | Jacob Vestergaard | Bárður á Lakjuni

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur | Árni Skaale | Beinir Johannesen